# Hesa ferð áttu vestmenningar tørn



*Vestmenningur gjørdist triðja 10-mannafarið í ár, sum vann FM-róður, og sum støðan er nú hava fýra bátar møguleika at gerast føroyameistarar*

Jóansøkan:

## Úrslitini av kapps róðrinum á jóansøku

**5-mannfør dreingir**

| | bátur | tíð |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 4.53,02 |
| 2 | Blikur | 4.55,01 |
| 4 | Fípan Fagra | 4.56,03 |
| 3 | Havfrúgvin | 5.00,09 |
| 5 | Tjaldrið | 5.00,22 |
| 6 | Drekin | 5.03,05 |
| 7 | Ørnin | 5.05,03 |
| 8 | Junkarin | 5.25,00 |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 5.02,16 |
| 2 | Riddarin | 5.05,08 |
| 3 | Páll Fangi | 5.08,09 |
| 4 | Gongurólvur | 5.11,01 |
| 5 | Lómur | 5.26,17 |
| 5 | Snopprikkur | 5.26,17 |
| 5 | Víkingur | 5.27,00 |
| 6 | Hvessingur | 5.27,19 |

**5-mannafør, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 4.10,02 |
| 2 | Fípan Fagra | 4.14,21 |
| 3 | Drekin | 5.17,12 |
| 4 | Blikur | 5.18,20 |
| 5 | Havfrúgvin | 5.19,04 |
| 6 | Ørnin | 5.21,20 |
| 7 | Tjaldrið | 5.25,11 |
| 8 | Frúgvin | 5.27,15 |
| 9 | Tekla | 5.28,08 |
| 10 | Royndin Fríða | 5.37,05 |
| 11 | Broddur | 5.44,15 |
| 12 | Dúgvan | 5.46,21 |
| 13 | Firvaldur | 5.50,16 |
| 14 | Junkarin | 5.51,10 |

**6-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Smyril | 4.45,09 |
| 2 | Gongurólvur | 4.48,20 |
| 3 | Páll Fangi | 4.52,06 |
| 4 | Strálan | 4.52,22 |
| 5 | Hvessingur | 4.53,05 |
| 6 | Sølmundur | 4.53,10 |
| 7 | Jarnbardur | 4.54,05 |
| 8 | Snopprikkur | 5.02,17 |
| 9 | Hósvíkingur | 5.05,07 |
| 10 | Víkingur | 5.10,18 |

**8-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kvívíkingur | 4.33,15 |
| 2 | Argjabáturin | 4.34,18 |
| 3 | Knørrur | 4.37,01 |
| 4 | Nevið Reyða | 4.41,09 |
| 5 | Húsavíkingur | 4.47,06 |
| 6 | Ørvur | 4.50,24 |

**10-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Vestmenningur | 4.22,02 |
| 2 | Eysturoyingur | 4.24,14 |
| 3 | Havnarbáturin | 4.24,24 |
| 4 | Klaksvíkingur | 4.28,01 |
| 5 | Nólsoyingur | 4.29,16 |

**Sigurin á 1000 metrum var meiri sannførandi, enn fleiri av sigrunum at 2000 metrum hava verið**

10–MANNAFØR

*Jóannes Hansen*

Tað hevur verið roknað við tí alt summar. Í trimum teimum fyrstu kappingunum syrgdu teir umborð á Eysturoyingi og Havnarbátinum fyri, at tað ikki gjørdist veruleiki.

Men á Vágsfirði megnaði eingin at byrgja uppfyri tí. Vestmenningur vann, og harvið blandaði hann seg av álvara upp í FM kappingina. Vestmenningar hava ikki vunnið ein 10–mannafarsróður síðani í fyrraárið, og teir høvdu avgjørt einki havt ímóti, um seinasti parturin av róðrarárinum í ár hevði lagað seg soleiðis, sum hann gjørdi ta ferðina.

– Tá vunnu vit á 1500 metrum í Klaksvík, og so vunnu vit tríggjar teir seinastu róðrarnar, sum vóru á 1000 metrum, m. a. í heimasjógvi í Vestmanna. Tað hevði við sær, at vit gjørdust meistarar. Í ár vunnu vit ikki á norðoyarstevnu, men vit hava møguleika at vinna tríggjar teir seinastu róðrarnar, sum allir eru á 1000 metrum. Um tað eydnast, so fara vit at vinna FM. Vit fara at leggja alt tað í, sum vit eiga, men um tað fer at røkka til sigur í Miðvági og á ólavsøku, tað fáa vit at síggja. Kappingin er so sera jøvn, at tað er møguleiki fyri at enda á øllum plássum.

Tað er Jan Johannesen, annar av lærmonnunum umborð á Vestmenningi, sum sigur hetta. Hann hevur róð í fleiri ár, og hann er ein av fýra, sum var við Vestmenninginum í ár og sum eisini var við í fjør.

– At vit hava skift nógv fólk vil ikki siga tað sama sum, at tað er spildurnýtt róðrarfólk við í ár. Onkrir, sum hava róð við Vestmenninginum áður, eru komnir umborð aftur, og onkrir, sum vóru við 6–mannafarinum Fortunu í fjør, eru nú umborð hjá okkum.

### Stýrdu skeivt

Vestmenningurin var væl fyri, tá tað varð kappast á Skálafjørðinum, men ta ferðina mistu teir sigurin til Eysturoying í síðstu tøkunum. Bátsformaðurin umborð á Vestmenninginum heldur seg vita, hví tað ikki royndist so væl ta ferðina:

– Vit fóru eitt sindur skeivir á síðsta teininum. Vit lógu uttarlaga í feltinum, og tað kostaði ivaleyst nógv, at vit ikki róðu so beint, sum vit skuldu havt gjørt.

*Men tað gjørdu tit hesa ferð, nú tit vóru eina bátslongd undan hinum?*

– Vt hava onkra ferðina havt ringar royndir í Vági, har málið vísir so skeivt. Eitt árið hildu vit okkum hava vunnið, men tá vóru vit snýttir. Hesa ferð vildu vit vera so mikið væl frammanfyri, at eingin ivi skuldi vera, men vit vóru ikki heilt vísir í, at vit høvdu vunnið, fyrrenn við fingu úrslitið staðfest. Tað var fínt. Móttøkan í Vestmanna var, sum hon plagar at vera, tá Vestmenningurin hevur vunnið, og nú verður tað sera spennandi at venja til tær báðar síðstu kappingarnar.

### Øðrvísi róður

Á longru teinunum hevur tað verið sera javnt millum 10–mannaførini. Tað var tað eisini í Vági, men sigurin hjá Vestmenningi var meiri sannførandi, enn sigrarnir hava verið vunnir í fleiri av hinum kappingunum. Vestmenningur var tað mesta av einari hálvari bátslongd undan Eysturoyinginum og Havnarbátinum, sum komu mest sum í senn á mál.

Klaksvíkingurin var tað mesta av einari bátslongd aftanfyri hinar bátarnar. Tað hevur ljóðað, at teir høvdu skift ein mann út umborð á Klaksvíkingi undan jóansøkuni. Tað er rætt, at teir høvdu sent fráboðan til RSF um, at ein nýggjur maður var komin umborð. Talan var um ein nýggjan stýrimann, tí hin hevði fingið forfall bara hesa eina ferðina.

Klaksvíkingurin hevði ein vánaligan start, og tað hevði við sær, at teir heldur kappaðust við Nólsoyingin um at sleppa undan aftasta plássinum, heldur enn at teir kappaðust við hinar manningarnar um at vinna.

Róðrarlagið var øðrvísi í Vági, enn tað hevur verið á longru teinunum. Ferðin var hægri, og tað var spurtað meiri, enn tað plagar at vera. Eingin ivi var um, at vestmenningar vóru teir stinnastu hesa ferð. Spurningurin er so, hvussu tað fer at hilnast í Miðvági og á ólavsøku. Spenningurin er í hvussu so er størri, enn hann hevur verið nógvu tey seinastu árini.



# Argir missir í miðróðrinum

**Við triðja sigrinum upp í slag styrkti Kvívíkingurin um sína støðu í kappingini um meistaraskapin**

8–MANNAFØR

*Jóannes Hansen*



*Sum úrslitini hava verið seinastu tríggjar róðrarnar, er lítil ivi um, at kvívíkingar eiga stinnastu manningina í kappingini hjá 8-mannaførum*

Kvívíkingar eiga bestu manningina í kappingini millum 8–mannafør. Tað vóru fyrstu ábendingarnar um á Skálafjørðinum, tá teir settu Argjabátin, sum hevði vunnið í Klaksvík, upp á pláss, tað sást aftur í Hósvík, og leygardagin var tað aftur staðfest á Vágsfirði.

Gongdin í kappingunum higartil hevur verið tann, at Argjabáturin hevur havt besta startin, og at Argjabáturin hevur staðið seg væl í endaspurtinum. Tað hevur verið í miðróðrinum, sum teir kalla tað, at Kvívíkingurin hevur vunnið seg til eitt greitt fremsta pláss. Og júst soleiðis var tað í Vági.

Á málinum var Kvívíkingur ein stóran skut undan Argjabátinum. Tað var eingin ivi um sigurin, men munurin var ikki størri enn so, at tað ber til at ímynda sær, at Argjabáturin hevur møguleika at geva Kvívíkinginum ein skarpan gang í Miðvági. Men so er treytin hjá argjamonnum, at teir fáa betri tak á miðróðrinum, enn teir hava havt tær seinastu ferðirnar.

Spurningurin er so, um teir umborð á Kvívíkinginum eiga meiri í sær til endaspurtin, enn tað hevur verið neyðugt hjá teimum at vísa tær seinastu ferðirnar.

### Smiðurin rør við

Sámal Hansen hevur smíðað Argjabátin, og hann hevur eisini smíðað Kvívíkingin. Í Miðvági verður ein nýggjur Ørvur við í kappingini. Sámal Hansen hevur eisini smíðað tann bátin.

Nevið Reyða vann FM í fjør. Í ár hava klaksvíkingar ikki mannað 8–mannafarið. Tí hava teir í Kapps róðrarfelagnum NSÍ lænt bátin, sum teir róðu við á Skálafjørðinum. Teir vóru ikki við í Hósvík, men leygardagin vóru teir við í Vági.

Umborð á Nevinum Reyða situr Sámal Hansen, sum eisini hevur smíðað tann bátin. Í Vági var Nevið Reyða leingi væl við í kappingini, men at enda sást tað væl, at teir vóru ikki í somu venjingarstøðuni, sum hinir vóru. Men hóast tað ikki eydnaðist honum og hansara at vinna, so kann Sámal Hansen gleðast um, at tað so at siga eru bátarnir hjá honum, sum vinna!

# Fleiri meistarar mugu bíða inntil á ólavsøku

**Á kvinnusíðuni er tað avgjørt, at FM vinnararnir verða funnir annan leygardag í Miðvági, og ímillum 10–mannaførini og dreingirnar er tað avgjørt, at FM vinnarin verður ikki funnin fyrrenn á ólavsøku**

KAPPRÓÐUR

*Jóannes Hansen*

Kapps róðrarárið hevur verið sera spennandi higartil. Aftur í Vági var talan um vinnara, sum var fremstur fyri fyrstu ferð í ár. Tað var Vestmeningur, sum kom fyrstur á mál í kappingini millum 10–mannafør. Vestmenningur hevði ikki vunnið frammanundan, og hann var triði vinnarin í ár. Hinir báðir vinnararnir hava verið Eysturoyingur, sum vann í Klaksvík og aftur á Skálafjørðinum, og so Havnarbáturin, sum var fremstur, tá tað næstsíðsta leygardag varð kappast í Hósvík.

Tað er so mikið tætt millum 10–mannaførini, at allir teir tríggir bátarnir, sum hava vunnið higartil í ár, framvegis hava góðan møguleika at vinna FM heitið. Nýggi Klaksvíkingurin hevur ikki vunnið higartil, og í Vági endaði hann á fjórða plássi. Men um klaksvíkingar vinna teir báðar róðrarnar, sum eru eftir, og Eysturoyingur í báðum róðrunum verður nummar fýra, so hevur Klaksvíkingur framvegis møguleika at vinna FM. Tað boðar frá, at kappingin er sera tøtt og jøvn.

### Tætt hjá dreingjunum

Umframt í kappingini millum 10–mannaførini er størsti spenningurin í kappingini millum dreingjamanningarnar. Fípan Fagra vann í Klaksvík og á Skálafjørðinum. Síðani tá hevur Sílið verið fremst, men kolldømingin av Sílinum á Skálafjørðinum hevur havt við sær, at tað framvegis er Fípan Fagra, sum er ovast í FM kappingini.

Dreingirnir umborð á Fípuni Føgru kunnu framvegis vinna fyrsta FM heitið í hesi kappingini til Klaksvíkar, síðani skipanin við stigum varð tikin í nýtslu í 1973, men teir fáa ein skarpan gang bæði frá havnardreingjum og argjadreingjum.

Tjaldrið vann FM bæði í fjør og í fyrraárið. Sílið hevur ikki vunnið FM síðani í 1992. Havnar Róðrarfelag vann dreingjakappingina í 1996 og í 1997. Tá var tað Drekin, sum var bestur. Blikur hevur ikki vunnið hesa kappingina síðani í 1988 og í 1989.

### Jarnbardur bestur

Jarnbardur við kvinnum og Sílið við gentum vóru aftur sera sannførandi hesa ferð. Hesar báðar manningarnar hava vunnið allar fýra kappingarnar, sum hava verið. Tað vil siga, at tær hava fult stigatal, sum er 28. Í báðum kappingunum hava fleiri bátar verið næstfremst. Tað hevur við sær, at munurin frá ávikavíst Jarnbardi og Sílinum og til hinar bátarnar er so mikið stórur, at tað ikki ber annað til, enn at hesar báðar manningarnar fara at vinna FM annan leygardag í Miðvági.

Kvinnurnar hava kappast um FM síðani í 1983. Um hugt verður at samantalda býtinum av FM sigrum, so sæst, at tað er rættuliga javnt. Gongurólvur (1984, 1985, 1988, 1994 og 1995) og Páll Fangi (1986, 1987, 1989, 1990 og 2001) hava vunnið fimm ferðir í part. Smyril vann í 1983, og Hvessingur vann í 1996 og í 1998.

Jarnbardur hevur vunnið FM fleiri ferðir enn nakar annar bátur í tí kappingini. Jarnbardur vann fyrstu ferð í 1991, og síðani hava tær vunnið í 1992, 1993, 1997, 1999 og í 2000. Tað vil við øðrum orðum siga, at FM heitið, sum tær fara at vinna í Miðvági annan leygardag, verður tað sjeynda hjá Jarnbardi.

Í fjør var Páll Fangi FM vinnari.

### Sílið er eisini best

Í FM kappingini millum 5–mannafør við gentum er heldur eingin ivi. Sílið hevur vunnið allar róðrarnar. Hinar manningarnar hava skiftst um at vera næstfremstar. Tí fer Sílið at vinna FM í Miðvági.

At gentubáturin hjá Havnar Róðrarfelag vinnur FM heitið er ikki nakað nýtt. 5–mannaførini við gentum hava kappast um FM øll árini, sum tað yvirhøvur hevur verið kappast um meistaraskapin. FM kappingin í tí líki, sum hon nú gongur fyri seg, hevur verið á skránni síðani 1973, og Sílið hevur higartil vunnið átta meistaraheiti. Seinastu ferðirnar at Sílið vann FM vóru í 1995 og í 1996. Ørnin eigur næstflestu sigrarnar. Sandavágsbáturin hevur vunnið fimm ferðir. Seinastu sigrarnir hjá teimum vóru í 1997 og í 1998.

Í fjør var Fípan Fagra FM vinnari.

### Umaftur og umaftur

Í kappingini millum 6–mannafør við monnum verður kappingin ikki heilt avgjørd í Miðvági. Men úrslitini tær seinastu ferðirnar tala nógv fyri, at vágbingar fara at vinna hesa kappingina fyri fyrstu ferð nakrantíð.

Vinnari tvey tey seinastu árini hevur verið Strálan av Strondum.

Í kappingini millum 8–mannafør vann Argjabáturin í Klaksvík. Síðani hevur Kvívíkingurin verið bestur, og tað skal nógv broytast í tveimum teimum síðstu kappingunum, um Kvívíkingurin ikki skal vinna FM á ólavsøku. Í fjør var Nevið Reyða FM vinnari.



*Fleiri ábendingar eru um, at vágbingar fyri fyrstu ferð yvirhøvur skulu gerast meistarar í 6-mannafarsróðrinum*

*Mynd: Áki Bertholdsen*